## Maður:Glotti á G! mini

Teir eru kendir fyri at prika og arga, og hava langtsíðani vunnið sær kultstatus. Nú geva teir nýggja fløgu út og spæla á G! Mini. Talan er um útisetabólkin maður:glotti við teimum báðum Ova ella Dennis Agerblad og Terji Messell. Nýggja útgávan, sum eisini er tann triðja hjá teimum, er úti nú og hevur fingið heitið ”Land”. Á heimasíðuni hjá G! Mini stendur, at fyriskipararnir eru glaðir fyri at kunna bjóða eina framførslu við maður:glotti á Spæliplássinum vikuskiftið 18. og 19. juli, har teir framføra løg av øllum trimum útgávunum hjá sær. Umframt hetta fer Ova ella Dennis Agerblad at framføra elektro lebastift í Ground Zero við hjálp frá Terja Messel.



## Karius & Baktus seta hol á

Bara grundin ikki brennur niður einaferð enn, ávara tey á heimasíðuni hjá festivalinum. Víðari stendur at lesa, at umframt at seta hol á festivalin headlina teir eisini Ground Zero leygarkvøldið 19. juli við einum maksimalum dance setti, ið borar seg fast, blæsur føtur uppfrá og heysar umkoll! Karius & Baktus eru barndómsvinir, sum hava gjørt elektroniskan tónleik og DJað saman síðani 2005. Teir hava spælt nógv á best umtóktu barrunum í Reykjavík síðani, og hava arbeitt og framført saman við nøkrum av fremstu DJunum í landinum har. Eisini hava teir framført til beach parties í Miðamerika, á kokteyl barrum í Milan og í klubbum í Boston. Teir skipa eisini sjálvir fyri undirgrund dance tiltøkum og leita altíð eftir nýggjum, frískum tónum at borðreiða við.

# Fingu ovurstóran kalva

**Í morgun kom ein yvirvaksin kalvi á land við bryggjuna í Vágsbotni. Hann vigar stívliga 200 pund og er 2,05 metrar til longdar.**

FISKUR
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Í morgun løgdu tveir mans, Jóhan Macdonald og Sonni Davidsen, at í Vágsbotni við einum forvitnisligum fongi. Teir hava seinastu dagarnar verið við kalvalínu í Skopunarflógvanum, og teir lata væl at fiskiskapinum. Hósdagin fingu teir fýra kalvar, har tann stórsti mundi viga umleið 170 pund. Tá settu teir 14 línur, sum teir so hava drigið aftur í morgun, og tað var á eini av hesum línum at hesin stóri kalvin beyt á.

Kalvin er 2,05 metrar til longdar, vigar stívliga 200 pund, og teir vænta at hann man verða um 20 ára gamal. Kalvin fer á uppboðssøluna, har hann verður seldur víðari, men tá vit spurdu um prísin, lótu teir einki serliga væl at. Teir vænta at prísurin liggur um 40 til 45 krónur fyri kiloið, og skuldi hesin kalvin einsamallur sostatt givið góðar 4000 til 4500 krónur í skjáttuna.

Báturin, ið teir hava verið við, eitur Skottin, og er tað Jóhan Macdonald, ið eigur hann. Hann sigur, at teir dríva ikki veruligan útróður, men at hetta er meira ein sportur hjá teimum.

- Hetta er ikki nakað, sum eg livi av at gera, men heldur ein sportur. Vit seta kalvalínu, og hana egna vit sjálvandi við hond. Vit brúka seið, og fiskiskapurin hevur verið á einari leið seinastu dagarnar, sigur Jóhan Macdonald.



*Á myndini síggjast f.v. Jóhan Macdonald og Sonni Davidsen, og frammanfyri teir liggur tann ovurstóri kalvin, ið teir fingu á kalvalínu í Skopunarflógvanum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Ólavsøkukonsertin avdúkar nú øll nøvnini

**Futt hevur avdúkað fimm av nøvnunum, sum fara at spæla á endurnýggjaðu ólavsøkukonsertini, men nú er klárt at avdúka øll nøvnini, sum fara á pallarnar í Tórsgøtu tann 25. juli**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Nýtt lív er blást í felagið FUT, sum nú eitur Futt, og ólavsøkukonsertin í ár er tískil eisini hamskift. Konsertin verður í Tórsgøtu í Havn á einum útipalli og á Tjóðpallinum, og øll hava sokallaðan VIP status, tí til ber at ganga og hugna sær á økinum og millum pallarnar.

Futt hevur lagt seg eftir at bjóða føroyskan tónleik og at hava tónleik á høgum støði. Futt hevur hesa vikuna latið nøkur nøvn likið út, men nú er klárt at avdúka nøvnini á øllum, sum fara á pall. Tey sum fara á pall eru hesi:

Hanus G Johansen við bólki, Páll Finnur Páll, Lena Anderssen, Sic, 200, BET YOU ARE WILLIAM, Synarchy, DJ Pete Switch, Eager to Please, Katla, Martin Joensen og Brandur Enni.

Atgongumerki til konsertina fáast hjá Tutl á Káta Horninum í Havn.



*Hanus G Johansen*

## Sex and the City og 005

Bólkurin 005 spælir til dans í Tvøroyrar Klubba leygarkvøldið, tá skipsð eisini verður fyri serligum kvøldið, tí Suðurbio vísir filmin Sex and The City.

005 er vældámdur bólkur, ið er samansettur av royndum tónleikarum, og bólkurin spælir bæði tað nýggjasta nýggja, og gott gamalt.

